# Úr Nólsoy til Eritrea at læra fátækar fiskimenn at fiska



**HJÁLPARARBEIÐI** – Vit kundu sigla í einar 10 tímar, og kortini var dýpið ikki meiri enn eina hálva snørislongd. Sjógvurin var ógvuliga klárur, og tú sást niður á botn langt út til havs. Nógvar korallir eru, bæði størri og smærri, men tað vísti seg, at nakrir av monnunum vóru rættiliga staðkendir. Millum korallirnar kundi vera sandbotnur, sigur Jack Thomsen

Vilmund Jacobsen

Síðan 2004 hevur »Livandi Hav«, sum er eitt danskt landsfelag við ymiskum áhugamálum innan hav um umhvørvi, stuðlað útróðrarmonnum í Eritrea, sum fiska í Reyða Havinum. Verkætlanin snýr seg eitt nú um at læra fátækar útróðrarmenn at fiska við línu, gørnum og snellu. Ymiskir grunnar, virkir og privat hava eisini stuðlað hesi verkætlan fíggjarliga og við keypi av útgerð.

Nólsoyingurin, Jack Thomsen, sum hevur verið fiskimaður alla sína tíð, hevur eisini fingið høvi at luttaka í tí partinum av verkætlanini, sum verður rópt »Hjálp frá fiskimanni til fiskimann«, sum er ein hjálparætlan millum fátækar fiskimenn í Eritrea.

Hevur nakar fingið línuveiði inn við móðurmjólkini, er tað Jack. Vit kunnu næstan siga, at hann er føddur við saltvatni í blóðinum. Sum bláðungur var hann ikki færri enn 13 túrar í slag við saltfiskalínuskipinum, Borðoyarnesi, har túrarnir lógu millum tríggjar og fimm mánaðir hvør.

Spurdi tú hann, tá hann kom aftur av túri, um hann ikki nú fór at taka ein frítúr, var standandi svarið ár um ár: »Eg haldi, at eg fari ein túr aftrat...«

Og soleiðis gjørdust túrarnir 13 í tali – út í eitt.

## Í Eritrea

Men Jack hevur ikki bara siglt við línuskipi. Í fleiri ár hevur hann eisini siglt við ymiskum trolarum, bæði á ísfiskaveiði og á rækjuveiði, og í Nólsoy hevur hann ein 27 føts útróðrarbát.

Onkur hevur sagt, at tað helst skal rulla undir fótinum á honum. Er hann ikki á skipsdekki, er hann í bátinum, tá høvi býðst.

Í heyst fekk Jack Thomsen so høvi til at vera við í hesi verkætlan saman við formanninum í »Livandi Hav«, Knud Andersen, sum er hálvur føroyingur.

– Eg fór avstað hin 26. oktober og var heima aftur akkurát ein mánað seinni. Nú er greitt, at vit skulu niður aftur í mars, men fyri ta tíð ætla vit at senda eina bingju niður við útgerð, soleiðis at hendan er komin fram, áðrenn vit koma niðuraftur.

Í bløðunum í vikuni hevur Jack Thomsen havt lýsing, har sóknast verður eftir brúktum hondsnellum, og lagt hevur verið aftrat, at gomul lína eisini er kærkomin. Hann sigur, at áhugi er eisini fyri teinum og loddum, um onkur eigur at geva burturav.



*Hetta er báturin, sum Jack Thomsen og Knud Andersen vóru við saman við fátækum fiskimonnum úr Eritrea*

**» Tað nyttar einki bara at senda bátar, skip ella útgerð niður. Neyðugt er eisini, at tú fert við og lærir tey at brúka útgerðina**

– Ætlanin er ikki neyðturviliga at fáa fiskireiðskap fyri einki, men bíliga, um tað letur seg gera, sigur hann.

## Tveir túrar

Jack sigur, at meðan teir vóru í Eritrea og í býnum, Massawa, sum liggur við Reyða Havið, gjørdu teir tveir túrar við einum umleið 40 føt stórum báti.

– Vit vóru 14 mans við bátinum, og hvør túrur sær vardi í fimm dagar. Vit royndu við línu um dagin og gørnum um náttina. Fiskurin, sum vit fingu í gørnunum, er bíligari enn fiskurin, sum tekur á línuna, og tí brúktu vit ein part av veiðini, sum vit fingu um náttina, til agn á línuni.

Fiskasløgini, sum teir fingu, líkast slett ikki teimum fiskasløgum, sum vit vanliga kenna um okkara leiðir.

Jack Thomsen sigur, at tað var rættiliga útgrunt á leiðini, har teir royndu.

– Vit kundu sigla í einar 10 tímar, og kortini var dýpið ikki meiri enn eina hálva snørislongd. Sjógvurin var ógvuliga klárur, og tú sást niður á botn langt út til havs. Nógvar korallir eru, bæði størri og smærri, men tað vísti seg, at nakrir av monnunum vóru rættiliga staðkendir. Millum korallirnar kundi vera sandbotnur.

Sum eitt dømi um, hvussu útgrunt tað er í støðum, sigur Jack, at teir tann eina dagin vóru á veg til lands eftir agni.

– Vit sigldu inn ímóti, og síðan kom ein minni bátur eftir okkum, sum skuldu í land eftir agni. Men heldur ikki hesin minni báturin kundi sigla heilt til lands. Vit noyddust at vassa tað seinasta korterið.

Jack sigur, at har var als